# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Uttan mun til tølini so eru vit vísir í, at talan verður um tætta uppgerð. Talan er altíð um stórt stríð, tá ið vit spæla ímóti Skála*

*Jens Martin Knudsen, NSÍ*

# Argja Róðrarfelag 25 ár




*Rógvararnir hjá Argja Róðrarfelag hava góðar umstøður í snotiliga róðrarneystinum, sum stendur við bátahylin á Argjum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eitt av størstu róðrarfeløgum í landinum, Argja Róðrarfelag, fylti í gjár 25 ár. Í gjøgnum árini hava bátar hjá Argja Róðrarfelag vunnið 16 føroyameistaraheiti, felagið bleiv valt til ársins róðrarfelag í 2004, umframt at felagið bleiv valt sum ársins ítróttarbragd hjá Dimmalætting sama ár**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

16. august í 1982 bleiv eitt nýtt róðrarfelag í Føroyum sett á stovn. Hetta var róðrarfelagið á Argjum, sum í dag telist ímillum størstu róðrarfeløg í landinum. Tað vil siga, at felagið í gjár hevði 25 ár á baki sum róðrarfelag, og eingin ivi er um, at felagið við árunum hevur voksið seg størri og størri.

Fyrsta bátin fekk felagið í 1983, tá 8-mannafarið, Argjabáturin, bleiv bygdur, og næsti báturin kom árið eftir, tá 5-mannafarið, Blikur, bleiv bygdur. Eftir hetta hevur Argja Róðrafelag fingið tveir bátar afturat. 6-mannafarið Lómur bleiv bygdur í 2002, og fyrr í ár fekk róðrarfelagið eitt nýtt 5-mannafar, sum bleiv kallað Teistin.

Hesi 25 árini, sum bátarnir hjá Argja Róðrarfelag hava kappast um føroyameistaraheitini, er tað blivið til 16 meistaraheiti í teimum ymisku bátaflokkunum, Argja Róðrarfelag bleiv valt til ársins róðrarfelag í 2004, og harumframt vann felagið eisini ársins ítróttarbragd hjá Dimmalætting sama ár.

## Genturnar á Bliki løgdu fyri

Sjálvt um Argjabáturin var fyrsti báturin hjá felagnum, so var tað tó Blikur, sum felagið fekk árið eftir Argjabátin, sum tryggjaði felagnum fyrstu føroyameistaraheitini.

Longu fyrsta árið, sum 5-mannafarið, Blikur, var við í kapping, megnaðu kvinnurnar av Argjum at vinna meistaraheitið. Stóran part av árinum var tó alt, sum bendi á, at Sílið fór at vinna meistaraheitið. Undan ólavsøkuróðrinum hevði Sílið vunnið tríggjar stevnur, meðan Blikur hevði vunnið eina, og munurin í millum bátarnar var heili fýra stig.

Á ólavsøku bleiv alt tó vent á høvdið. Blikur vann róðurin, meðan Sílið endaði heilt afturi á fjórða plássi. Hetta gjørdi, at liðini endaðu jøvn í stigum, men av tí at Blikur vann á ólavsøku, so vunnu genturnar av Argjum eisini meistaraheitið.

Hetta gjørdist sostatt fyrsta meistaraheitið hjá Argja Róðrarfelag.

## Fleiri meistaraheiti til Blik

Næstu árini var tað Blikur, sum fekk góðu úrslitini hjá Róðrarfelagnum. Árið eftir fyrsta meistaraheitið hjá Argja Róðrarfelag í 1985 vann felagið enn eitt meistaraheiti. Hesa ferð vóru tað dreingirnir umborð á Bliki, sum endaðu ovast eftir tær fimm stevnurnar.

Fyrstu stevnuna fekk Blikur einki stig, men næstu tríggjar stevnurnar vunnu dreingirnir av Argjum, og sostatt varð lagt upp til enn ein sigur og eitt meistaraheiti á ólavsøku. Sigurin fingu teir ikki, tí teir endaðu á fimta plássi, men teir vóru tó so langt framman fyri í FM-kappingini undan ólavsøkuróðrinum, at hana vunnu teir kortini.

Í 1986 fekk felagið triðja meistaraheitið, tá tað aftur vóru kvinnurnar á Bliki, sum endaðu ovast. Kappingin var hørð við Bylgjuna alt hetta árið, men Blikur var alla tíðina eitt fet frammanfyri. Báturin av Argjum vann á Eystanstevnu, á Jóansøku og á ólavsøku, og í FM-kappingini endaði Blikur fimm stig framman fyri Bylgjuna.

So skuldi tað ganga tvey ár, áðrenn felagið aftur endaði á ovastu rók. Hesa ferð vóru tað aftur dreingirnir umborð á Bliki, sum endaðu fremst, men tað var í sera harðari kapping við Koll. Undan ólavsøkuni høvdu bátarnir vunnið tveir róðrar hvør, men Blikur var tó eitt stig frammanfyri.

Á ólavsøkuni vann hvørgin teirra, tí Tarvurin endaði fremst, men Blikur endaði á øðrum plássi og Kollur á triðja, og tí var tað Blikur, sum vann meistaraheitið.

Og árið eftir vóru tað aftur dreingirnir umborð á Bliki, sum vunnu meistaraheitið. Kappingin var sera hørð hetta árið millum fleiri bátar, men tá alt kom til alt var tað tó Blikur, sum var tann sterkasti. Eftir sigurin á ólavsøku var Blikur sjey stig framman fyri næstu bátarnar í FM-kappingini, og fimta meistaraheitið hjá Argja Róðrarfelag var veruleiki.

## Argjabáturin tekur yvir

Í 1990 vann felagið einki meistaraheiti, men í 1991 bragdaði aftur. Nú var tað tó ikki Blikur, sum setti dagsskránna, men í staðin var tað flaggskipið, Argjabáturin, sum nú byrjaði at vinna. Hetta gjørdist eisini byrjanin til nøkur sera góð ár hjá 8-mannafarinum á Argjum.

Hetta árið vann Argjabáturin bert tvær stevnur, á Jóansøku og á Varmakeldu, men úrslitini vóru tó so góð, at báturin endaði rættiliga langt fremstur í FM-kappingini.

Í 1992 vann Argjabáturin aftur FM. Hesa ferð var tó eingin ivi. Teir vunnu nevniliga fimm av teimum seks stevnunum, og endaðu langt fremstir í FM-kappingini.

So gingu aftur tvey ár, áðrenn Argjabáturin aftur vísti flaggið. Í 1994 vann hann fýra av FM-róðrunum, men í FM-kappingini endaði hann heili 18 stig fram-

## FAKTA

### Bátar hjá Argja Róðrarfelag

**5-mannafør:**
Blikur
Teistin

**6-mannafør:**
Lómur

**8-mannafør:**
Argjabáturin